Føroya Kærustovnur

**Avgerð frá 4. juli 2023**
**Kærari: P/f FT Samskifti**
**Myndugleiki: Kappingarráðið**
**Málstal: 23/11521**
**Evni: FT Samskifti hevur misnýtt sína ráðandi støðu í sambandi við sítt aftursvar tann 25. apríl 2018**

P/f FT Samskifti hevur kært avgerðina hjá Kappingarráðnum frá 20. apríl 2023 um, at FT Samskifti hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini í sambandi við sítt aftursvar tann 25. apríl 2018.

Samlað málslýsing er at finna aftast í hesum skjalinum.

**Fundur tann 4. juli 2023**
Á fundi tann 4. juli 2023 møttu partarnir fyri at bera fram síni sjónarmið.

Fyri kæraran møttu William Joensen, fíggjarstjóri, Andreas Christensen, advokatur, Nicholai Pheiffer frá White Label Consultancy og Óli Meinertsson Hansen, advokatur.

Fyri kappingarráðið møttu Terje Sigurðsson, deildarstjóri, Sigurd Rasmussen, fulltrúi, og Anfinn V. Hansen, advokatur.

Partarnir bóru fram síni sjónarmið soleiðis, sum tey í stóran mun áður eru borin fram skrivliga.

**Lógargrundarlag**
Løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022 (kappingarlógin) *(Nýggj kappingarlóg kom í gildi tann 30. mai 2023, men avgerðin tekur støði í gomlu kappingarlógini, sum var galdandi, tá Kappingarráðið tók avgerð í málinum)*

**Avgerðin hjá Føroya Kærustovni**
Sbrt. § 11, stk. 1 í kappingarlógini er tað ikki loyvt eini ella fleiri fyritøkum og øðrum at misnýta eina ráðandi marknaðarstøðu.

Tað er Kappingarráðið, ið hevur próvbyrðuna fyri, at talan er um eina ráðandi støðu, og at hon verður misnýtt.

Áðrenn støða kann takast til, um FT Samskifti við datagávuni hevur misnýtt eina ráðandi støðu og hervið framt brot á § 11 í kappingarlógini, er neyðugt at skilmarka viðkomandi marknaðin og kanna, um FT Samskifti hevur ráðandi støðu á viðkomandi marknaðinum.

Kappingarráðið og FT Samskifti eru samd um skilmarkingina av viðkomandi marknaðinum – privat fartelefonihald buntað við talu, sms og data í Føroyum.

Partarnir eru somuleiðis samdir um, at FT samskifti hevur eina ráðandi støðu á føroyska marknaðinum fyri privat fartelefonihald buntað við talu, sms og data.

Vísandi til upplýsingarnar í málinum er Føroya Kærustovnur somuleiðis samdur í skilmarkingini av marknaðinum og ráðandi støðuni hjá FT Samskifti.

Tá tað er staðfest, at FT Samskifti hevur ráðandi støðu á viðkomandi marknaðinum, kann støða takast til, hvørt FT Samskifti hevur misnýtt sína ráðandi støðu og hervið framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini, tá felagið tann 25. apríl 2018 gav øllum verandi og nýggjum Ver-kundum eina gávu á 100GB data at brúka fram til árslok 2018.

Sambært Kappingarráðnum hevur FT Samskifti framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini í sambandi við sítt aftursvar tann 25. apríl 2018, tí:

1. Talan var um eitt aftursvar, sum var grundað á fíggjarliga megi og ta søguligu støðu, sum felagið hevur á marknaðinum, heldur enn á kappingarligar fyrimunir (competition on the merits)
2. Aftursvarið hevði ta avleiðing, at atgongdin til marknaðin varð hindrað í gildistíðini og avmarkað frameftir.

FT Samskifti førir fram, at Kappingarráðið ikki hevur lyft próvbyrðuna fyri, at FT Samskifti skal hava misnýtt sína ráðandi marknaðarstøðu.

<u>Yvirskipað um misnýtslu</u>

Kærustovnurin viðmerkir, at tað ikki í sjálvum sær er brot á kappingarlógina, at ein fyritøka hevur eina ráðandi støðu. § 11 í kappingarlógini skilmarkar ikki, hvat misnýtsla er, men í § 11, stk. 3 í kappingarlógini verða nøkur dømir uppá misnýtslu nevnd.

Vanliga skilur man ímillum tvey sløg av misnýtslu; útihýsandi misnýtslu og útnyttandi misnýtslu.
Útihýsandi misnýtsla er at rokna sum ein framferð, sum skaðar kappingina, við at kappingarneytarnir hjá ráðandi fyritøkuni verða hildnir heilt ella lutvíst úti av marknaðinum ella verða trýstir út av marknaðinum.
Útnyttandi misnýtsla er at rokna sum ein framferð, sum skaðar kappingina, við at ráðandi fyritøkan misnýtir sínar handilsfelagar og tryggjar sær handilsfyrimunir, sum viðkomandi fyritøkan ikki hevði kunnað fingið, um kappingin hevði verið vanlig og nóg effektiv, sí s. 653 í *Konkurrenceloven med kommentarer, 5. udgave.*

Í *Hoffmann-La Roche*, mál C-85/76, reglubrot 91, skilmarkaði Dómstólurin misnýtsluhugtakið soleiðis:

> *"[M]isbrugsbegrebet er et objektivt begreb, som omfatter en af en markedsdominerende virksomhed udvist adfærd, som efter sin art kan påvirke strukturen på et marked, hvor konkurrencen netop som følge af den pågældende virksomheds tilstedeværelse allerede er afsvækket, og som bevirker, at der lægges hindringer i vejen for at opretholde den endnu bestående konkurrence på markedet eller udviklingen af denne konkurrence som følge af, at der tages andre midler i brug end i den normale konkurrence om afsætning af varer og tjenesteydelser, der udspiller sig på grundlag af de erhvervsdrivendes ydelser."*

Í *Post Danmark og Konkurrencerådet*, mál C-209/10, reglubrot 24, varð misnýtsluhugtakið skilmarkað soleiðis:

> *"[...] en af en dominerende virksomhed udvist adfærd, som, idet der anvendes metoder, der adskiller sig fra dem, der regulerer en normal konkurrence på grundlag af de erhvervsdrivendes ydelser, har til virkning til skade for forbrugerne at skabe hindringer for opretholdelsen af den grad af konkurrence, der stadig findes på markedet, eller for udviklingen af denne konkurrence [...]"*

Sambært avgerð hjá danska Kappingarráðnum frá 30. januar 2019, *Falcks ekskluderende misbrugsadfærd på det danske marked for ambulancetjenester*, reglubrot 745, skal hetta skiljast soleiðis, at "*[...] den dominerende virksomheds forretningsmæssige adfærd, i relation til sine konkurrenter på det relevante marked, ikke er normal, men i sig selv går længere end hvad der med rette kan forventes af en sådan virksomhed, og at virksomheden anvender sin markedsmagt til at konkurrere på en måde, som i sidste ende ikke er til gavn for forbrugerne. Dette er udtryk for, at der ikke er tale om "competition on the merits"*."

Sambært rættarvenju er ein treyt fyri, at talan er um misnýtslu eftir § 11 í kappingarlógini sostatt, at ráðandi fyritøkan nýtir onnur amboð enn tey, sum eru vanlig í kappingini.

Hetta merkir tó ikki, at talan einans er um misnýtslu, um ráðandi fyritøkan nýtir "óvanlig" amboð. Sambært rættarvenju hevur ein ráðandi fyritøka eina serliga skyldu til at tryggja, at hennara framferð ikki skaðar kappingina á viðkomandi marknaðinum. Henda serliga skyldan hevur við sær, at fyritøkan í serligum førum kann verða avskorin frá framferð, sum í sjálvum sær ikki er misnýtsla og ikki var atfinningarsom, um fyritøkan ikki hevði eina ráðandi marknaðarstøðu, sí s. 654f í *Konkurrenceloven med kommentarer, 5. udgave*.

Tað er harumframt ein treyt fyri, at talan er um misnýtslu eftir § 11 í kappingarlógini, at framferðin hjá ráðandi fyritøkuni er egnað til at ávirka kappingina, ella at framferðin sannlíkt fer at ávirka kappingina, sí s. 658f í *Konkurrenceloven med kommentarer, 5. udgave*. Summi sløg av misnýtslu eru av síni náttúru ólóglig. Fyri

hesi sløgini av misnýtslu er tað nóg mikið, at misnýtslan er egnað til at ávirka kappingina. Onnur sløg av misnýtslu eru harafturímóti ikki av síni náttúru ólóglig, og tá er neyðugt at kanna, hvørt framferðin sannlíkt fer at avmarka kappingina.

Fyri at avgera, um ein ráðandi fyritøka hevur misnýtt sína ráðandi marknaðarstøðu, er tað somuleiðis neyðugt at gera eina samlaða meting av øllum viðurskiftum. Ein framferð, sum í sjálvum sær ikki hevði verið misnýtsla, kann blíva tað, tá framferðin sæst í sambandi við aðrar framferðir og onnur viðurskifti, sí s. 655 í *Konkurrenceloven med kommentarer, 5. udgave.*

General Advokatur Rantos hevur í *Servizio Elettrico*, mál C-377/20, reglubrot 62, sagt soleiðis um ta framferðina, ið er partur av vanligari kapping, og ta framferðina, sum ikki er tað:
*"... de typer adfærd, som falder uden for begrebet »konkurrence på ydelser«, generelt er kendetegnet ved det forhold, at der ikke foreligger indlysende eller objektive økonomiske begrundelser. Den type adfærd, der kan reducere den dominerende virksomheds omkostninger i kraft af effektivisering på anden vis, og som giver forbrugerne et større udvalg, idet der markedsføres nye varer, eller de eksisterende varer udbydes i større mængder eller en højere kvalitet, betragtes derfor som et eksempel på konkurrence på ydelser. Hvis der ikke foreligger anden begrundelse for adfærden, end at den har til formål at tilføje konkurrenterne skade, hører den derimod ikke nødvendigvis til inden for en konkurrence på ydelser."*

Greiningarháttur

Viðmerkt verður, at tað ikki Kærustovninum kunnugt finnast avgerðir um brot á kappingarreglunum, ið snúgva seg um eina støðu sum tí í hesum málinum, har ein ráðandi fyritøka hevur givið øllum nýggjum og verandi kundum eina gávu á 100GB data at nýta til árslok. Tískil er tað heldur ikki í rættarvenjuni siðvenja fyri, hvussu tílík mál skulu greinast, hvørjar kanningar skulu gerast, og hvør analysuramma skal nýtast.

Sum greitt frá omanfyri er tað tó sambært rættarvenjuni avgerandi fyri, um talan er um misnýtslu av ráðandi marknaðarstøðuni, at framferðin hjá ráðandi fyritøkuni ikki er "competition on the merits", og at framferðin er egnað til at ávirka kappingina, ella at tað er sannlíkt, at framferðin fer at avmarka kappingina á viðkomandi marknaðinum.

Hetta er analysuramman fyri flestu sløgini av misnýtslu, og tað er eisini hendan ramman, ið verður nýtt til at viðgera, hvørt framferðin hjá FT Samskifti í hesum málinum er at meta sum misnýtsla av ráðandi marknaðarstøðuni.

Kærustovnurin skal í hesum sambandi viðmerkja, at royndin hjá Kærustovninum av málinum er ein fullfíggjað roynd av øllum faktum og rættarligum spurningum í málinum, sí § 6, stk. 1 í lóg um Føroya Kærustovn.

FT Samskifti nýtti onnur amboð enn tey, ið eru vanlig í kappingini

Viðmerkt verður, at datagávur í sjálvum sær ikki eru óvanligar í kappingini. Sambært upplýsingunum í málinum hevur FT Samskifti mangan latið datagávur í sambandi við føðingardagar o.a.

Spurningurin er tó, um ein datagáva á 100GB, ið verður givin við teimum treytum og við tí gildistíð, sum datagávan frá FT Samskifti varð, kann sigast at vera óvanlig í kappingini.

Kundar hjá FT Samskifti hava áður fingið bjóðað eina avmarkaða nøgd av data – 24GB var sambært upplýsingunum í málinum størsta nøgdin av data, ið varð givin í einum – tó við meira umfatandi treytum. Treytirnar hava annaðhvørt verið, at kundin skuldi keypa eitt hvørt fyri at fáa gávuna, ella skuldi kundin luttaka í onkrum tiltaki, har Føroya Tele var sponsorur.

Harumframt kann sigast, at gávurnar, ið FT Samskifti áður hevur bjóðað, hava havt eitt greitt handilsligt endamál. Kærustovnurin hevur trupult við at síggja, hvat handilsliga endamálið við gávuni á 100GB skuldi verið, serliga tá tað er upplýst, at FT Samskifti í sambandi við gávuna bæði hevur mist inntøkur umframt átikið sær meirkostnað. Mett verður, at gávan gav ikki handilsliga meining í longdini, tá talan júst var um eina gávu, ið gekk út, og ikki um eina varandi gávu ella tænastu. Fíggjarliga tapið hjá FT Samskifti í samband við gávuna kann tískil heldur ikki forsvarast við hesum.

Vísandi til upplýsingarnar í málinum metir Kærustovnurin ikki, at endamálið við gávuni kann hava verið annað enn ein roynd at tryggja, at datarull-tænastan ikki skuldi fáa undirtøku. Hetta verður somuleiðis stuðlað av, at leiðslupersónur endar innanhýsis-samskiftið fríggjadagin tann 27. apríl 2018 við at siga, at aftursvarið verður á skrá mánadagin, "*tí Nema nú hevur tikið lívið av datarull-tænastuni*". Kærustovnurin skilur hesa útsøgn soleiðis, at nú var ikki neyðugt at skunda sær at koma við einum reellum aftursvari, tí datagávan frá FT Samskifti og eftirfylgjandi gávan frá Nema hava tikið lívið av datarull.

Sambært innanhýsis-samskiftinum sæst, at leiðslupersónurin setti spurnartekin við, um ein gáva á 40GB data var ov nógv at geva. Leiðslupersónurin má metast at vera persónur, ið hevur kunnleika og vitan um føroyska marknaðinum fyri privat fartelefonihald buntað við talu, sms og data, og hvat er vanligt á marknaðinum, og talar útsøgn hansara tískil fyri, at ein datagáva á 100GB ikki var vanlig.

Samanumtikið kann sigast, at tað, sum ger datagávuna á 100GB óvanliga, er støddin á gávuni, treytirnar fyri gávuni og gildistíðin á gávuni. FT Samskifti hevur ikki áður bjóðað sínum egnu kundum ella nýggjum kundum so stóra og treytaleysa gávu fyrr, og tí brýtur gávan frá teimum gávunum, ið áður eru bjóðaðar á føroyska fartelefonimarknaðinum.

Mett verður, at FT Samskifti við at geva øllum verandi og nýggjum Ver-kundum eina gávu á 100GB data at brúka fram til árslok 2018 hevur brúkt sína ráðandi støðu til at kappast upp á ein máta, sum í síðsta enda ikki gagnaði brúkaranum, og at framferðin hjá FT Samskifti fór út um tað, ið var neyðugt fyri at verja handilsligu áhugamálini hjá felagnum. Kærustovnurin metir samanumtikið ikki, at framferðin hjá FT Samskifti var “competition on the merits”.

Kærustovnurin skal at enda vísa á, at FT Samskifti hevur ført fram, at Kappingareftirlitið átti at havt framt ein AEC-test í sambandi við sína viðgerð av, um datagávan er “competition on the merits”. Kærustovnurin viðmerkir, at tá talan er um eitt slag av misnýtslu, sum ikki áður er kent í rættarvenjuni, so er ikki føst siðvenja fyri, hvørjar kanningar/testir skulu gerast. Tað kann sostatt ikki sigast at vera eitt krav at fremja ein AEC-test í sambandi við viðgerðina av fyriliggjandi málinum. Kærustovnurin dugir harumframt ikki at síggja týdningin av at fremja ein AEC-test í júst hesum málinum, tí tað framgongur longu av upplýsingunum í málinum, at Nema, sum sambært FT Samskifti ikki er ein eins effektivur kappingarneyti sum FT Samskifti, megnaði at geva eina líknandi gávu.

Framferðin var egnað til at ávirka kappingina

Sum víst á omanfyri skal framferðin hjá ráðandi fyritøkuni vera egnað til at ávirka kappingina, ella skal framferðin sannlíkt fara at ávirka kappingina, fyri at talan er um misnýtslu eftir § 11 í kappingarlógini.

Kappingarráðið metir, at framferðin hjá FT Samskifti var egnað til at ávirka kappingina. Hetta verður m.a. grundað soleiðis: “*Framferð sum í sær sjálvum er ólóglig er t.d. ránsprísir og ekslusiv avsláttur. Talan eru um framferð, sum er ólóglig uttan mun til um ávirkanin á kappingina er sannlík. Talan er ikki bara um vanlig brot, sum koma undir hendan bólk. Hóttanir og útspillingar eru eisini dømi um slíka framferð, sum verða mett at vera egnað til at avmarka kappingina. Tað sum eyðkennir hesi brot er, at framferðin hevur eina og aleina til endamál at raka kappingarneyta. Kappingareftirlitið metir av hesi orsøk at framferðin hjá P/f FT Samskifti er slík, sum í sær sjálvum er í ósamsvar við § 11 í kappingarlógini.*”

FT Samskifti hevur harafturímóti ført fram, at datagávan ikki er ólóglig í síni náttúru, og at datagávan “*således [skal] have en sandsynlig konkurrencebegrænsende virkning for at være ulovlig.*”

Kærustovnurin vísir á, at sambært pkt. 20 í vegleiðingin hjá Kommissiónini um prioritering av art. 102, framgongur, at: “*[g]enerelt forholder det sig således, at jo stærkere den dominerende stilling er, desto større er sandsynligheden for, at den adfærd, der udøves for at beskytte denne stilling, fører til konkurrenceskadelig afskærmning.*” FT Samskifti stóð sera sterkt á marknaðinum fyri privat fartelefonihald buntað við talu, sms og data í Føroyum við yvir 70% av marknaðarpørtunum í tíðarskeiðinum 2015-2018. Kærustovnurin metir, at við einum marknaðarparti á yvir 70% skal sera lítið til, fyri at framferðin hjá FT Samskifti er egnað til at avmarka kappingina á viðkomandi marknaðinum.

Kappingareftirlitið hevur ført fram, at datagávan var egnað til at fastfrysta marknaðarstøðuna fram til ársenda, og at avleiðingin av at bjóða gávuna til allar kundar á marknaðinum var, at marknaðurin floymdi yvir við data í teir 8 mánaðirnir, gávan var í gildi. Kappingareftirlitið metir, at avleiðingin av hesum var, at marknaðurin reelt var læstur fyri triðja part í gávutíðarskeiðinum. FT Samskifti hevur hinvegin ført fram, at marknaðurin ikki var læstur og vísir í hesum sambandi á, at talið av porteringum var støðugt árini 2017-2019, ið prógvar, at datagávan ikki fastlæsti marknaðin.

Kærustovnurin tekur undir við, at avleiðingin av, at FT Samskifti og Nema komu við egnari gávu á 100+GB data at brúka í 2018, var, at marknaðurin fleyt yvir við data. Kapping um data varð við hesum sett úr spæl, og í einum fartelefonihaldi buntað við fríari talu, fríum sms umframt meira data, enn hvat ein klárar at brúka, er avleiðingin av datagávunum, at prísur sum so er tað einasta, man kundi kappast um í gávutíðarskeiðinum.

Harumframt metir Kærustovnurin, at tað í gávutíðarskeiðinum var nærum ógjørligt hjá eini nýggjari fyritøku at trína inn á marknaðin. Brúkarar høvdu í gávutíðarskeiðinum ríkiligt av øllum, og tað skuldi tí okkurt heilt serligt til fyri at lokka kundar at skifta til ein nýggjan veitara. Hóast nýggja fyritøkan bæði hevur kappingarførar prísir og bjóðar eina størri datagávu, vil tað framvegis vera sera torført hjá fyritøkuni at vinna kundar til sín, tí kundarnir hava ríkiligt av data. Kærustovnurin metir sostatt, at avleiðingin av datagávunum var, at tað ikki var ráðiligt hjá nýggjum fyritøkum at trína inn á marknaðin í gávutíðarskeiðinum.

Kærustovnurin metir samanumtikið, at atgongdin til marknaðin varð hindrað í gávutíðarskeiðinum. Mett verður somuleiðis, at hetta talar fyri, at marknaðurin faktiskt varð fastlæstur í gávutíðarskeiðinum. Kærustovnurin metir ikki, at talið av porteringum í árunum 2017-2019 mótprógvar hesum.

Kærustovnurin viðmerkir, at FT Samskifti sum ráðandi fyritøka hevur eina serliga skyldu til at tryggja, at hennara framferð ikki skaðar kappingina á marknaðinum fyri privat fartelefonihald buntað við talu, sms og data í Føroyum. Sambært rættarvenju hevur hendan serliga skyldan við sær, at FT Samskifti í serligum førum kann verða avskorin frá framferð, sum í sjálvum sær ikki er misnýtsla og ikki var atfinningarsom, um felagið ikki hevði eina ráðandi marknaðarstøðu. Tað er longu staðfest, at FT Samskifti brúkti onnur amboð enn tey, ið eru vanlig í kappingini, tá fyritøkan valdi at geva øllum verandi og nýggjum Ver-brúkarum datagávuna. Harumframt er staðfest, at framferðin hjá felagnum hevði ta avleiðing, at atgongdin til marknaðin varð hindrað í gávutíðarskeiðinum. Kærustovnurin metir samanumtikið ikki, at FT Samskifti hevur yvirhildið hesa serligu skylduna, og hetta talar fyri, at framferðin hjá FT Samskifti var egnað til at avmarka kappingina á marknaðinum.

Kærustovnurin skal vísa á, at vanliga skilur man ímillum misnýtslu, sum í síni náttúru er ólóglig, og misnýtslu, sum ikki í síni náttúru er ólóglig. Tá talan er um misnýtslu, sum í síni náttúru er ólóglig, tá er tað nóg mikið, at misnýtslan er egnað til at ávirka kappingina. Tá talan hinvegin er um misnýtslu, sum ikki í síni náttúru er ólóglig, tá er neyðugt at kanna, hvørt framferðin sannlíkt fer at avmarka kappingina. Sum dømi um misnýtslu, sum í síni náttúru er ólóglig, verður í *Konkurrenceloven med kommentarer, 5. Udgave, s. 658* m.a. nevnt "urimeligt lave priser under de gennemsnitlige variable omkostninger".

Lágir prísir eru ikki í síni náttúru ólógligir. Hinvegin eru *órímiliga* lági prísir, *sum liggja undir miðal broytiligu kostnaðunum*, í síni náttúru eru ólógligir. Kærustovnurin metir í tráð við hetta, at datagávur ikki í síni náttúru eru ólógligar, men at ovurhondgávur í síni náttúru kunnu vera ólógligar, og Kærustovnurin metir, at júst hendan ovurhondsgávan – datagávan á 100GB data – í síni náttúru er ólóglig.

Vísandi til omanfyristandandi metir Kærustovnurin samanumtikið, at framferðin hjá FT Samskifti var ólóglig, var egnað til og faktiskt hevur avmarkað kappingina á viðkomandi marknaðinum í gávutíðarskeiðinum.

<u>Datagávan hevur ikki havt langtíðar avleiðingar fyri atgongdina til marknaðin</u>

Kappingareftirlitið førir fram, at framferðin hjá FT Samskifti hevur havt ta langtíðaravleiðing at avmarka atgongdina til viðkomandi marknaðin í framtíðini, tí: "*talan var um eina serliga ógvusliga framferð, har Føroya Tele vísti, at um aðrir á marknaðinum ikki fara fram, sum felagið ynskir, er man til reiðar bæði at frásiga sær inntøkur og átaka sær kostnað fyri at raka viðkomandi felag.*"

Kærustovnurin metir, at um FT Samskifti fer at hava eina framferð líknandi tí í málinum, hvørjaferð ein kappingarneyti kemur við einum átaki, ið felagið følir seg hótt av ella bert ikki ynskir skal fáa undirtøku, er vandi fyri, at kappingarneytar sum frá líður steðga við at bjóða út nýggjar tænastur ella koma við nýggjum átøkum. Avleiðingin av hesum vil verða, at kappingin og menningin á marknaðinum verður avmarkað til tað, sum FT Samskifti loyvir. Hetta er skaðiligt fyri kappingina og í síðsta enda fyri brúkaran.
Kærustovnurin metir somuleiðis, at vandi kann hugsast at vera fyri, at nýggjar fyritøkur fara at vera afturhaldandi við at trína inn á marknaðin, um FT Samskifti fer at hava eina framferð líknandi tí í málinum, hvørja ferð ein kappingarneyti kemur við einum átaki, ið felagið følir seg hótt av ella ikki ynskir skal fáa undirtøku.

Hóast Kærustovnurin er av hesi áskoðan, so metir Kærustovnurin ikki, at tað við verandi upplýsingum kann staðfestast, at atgongdin til marknaðin í framtíðini faktiskt er avmarkað orsakað av framferðini hjá FT Samskifti. Kærustovnurin metir sostatt ikki, at Kappingareftirlitið hevur lyft próvbyrðuna fyri hesum uppáhaldi.

<u>Objektiv grundgeving</u>

Føroya Kærustovnur

Ein ráðandi fyritøka hevur møguleika at grunda sína framferð objektivt, og talan vil í tílíkum førum ikki vera um misnýtslu.

Sambært rættarvenju hevur ein ráðandi fyritøka rætt til at verja síni handilsligu áhugamál, tá hesi verða hótt. Tað er tó ein treyt, at aftursvarið; "*... skal (...) under hensyntagen til de pågældende virksomheders økonomiske styrke stå i et rimeligt forhold til truslen.*", sí *United Brands*, mál C-27/76, reglubrot 190. Kærustovnurin metir ikki, at framferðin hjá FT Samskifti stóð í lutfalli við ta hóttan, felagið var undir. Tað er rætt, sum FT Samskifti førir fram, at datarull-tænastan broytti tann mátan, data í einum privatum haldi higartil varð samansett uppá. Tó so skal havast í huga fíggjarligu megina hjá FT Samskifti og ta støðu á marknaðinum, felagið hevur. Datarull var ikki ein broyting á marknaðinum, ið setti virksemið hjá FT Samskifti í vanda, og tænastan ávirkaði bert ein avmarkaðan kundaskara hjá FT Samskifti, meðan datagávan hjá FT Samskifti hinvegin setti átakið hjá Nema púra til viks.

Niðurstøða

Vísandi til omanfyri standandi metir Kærustovnurin samanumtikið, at FT Samskifti við sítt aftursvar tann 25. apríl 2018 hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini. Mett verður, at FT Samskifti við at geva øllum verandi og nýggjum Ver-kundum eina gávu á 100GB data at brúka fram til árslok 2018 hevur brúkt onnur amboð enn tey, ið eru vanlig í kappingini, og at framferðin hjá FT Samskifti var egnað til og hevur avmarkað kappingina á viðkomandi marknaðinum í teir 8 mánaðirnir, gávan var í gildi.

Kærustovnurin metir ikki, at FT Samskifti hevur víst á objektivar grundir, ið kunnu grundað, at FT Samskifti hóast alt ikki hevur misnýtt sína ráðandi støðu á viðkomandi marknaðinum.

**Samanumtikið staðfestir Føroya Kærustovnur avgerðina hjá Kappingarráðnum, at FT Samskifti hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini í samband við sítt aftursvar tann 25. apríl 2018.**

Henda avgerð er endalig innan fyrisitingina, men kann skjótast inn fyri Føroya Rætt innan 6 mánaðir eftir, at avgerðin er fráboðað.

Til kunningar verður sagt frá, at ein navnleys endurgeving av hesi avgerð ætlandi verður løgd út á heimasíðu okkara www.fks.fo.

Føroya Kærustovnur

Anja Hovgaard, stjóri

Rebekka Røsvik, løgfrøðingur